# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Bókakvøld á Klaksvíkar bókasavni

**Sum nakað nýtt fer Klaksvíkar bókasavn í vetur at skipa fyri tveimum bókakvøldum har ætlanin er at viðgera eina ávísa skaldsøgu**

BÓKAKVØLD

Nógvastaðni er vanligt at vera við í einum lesiringi, har fólk møtast at tosa um skaldsøgur, og tað er eftir hesum leisti, at hesi bókakvøldini vera skipaði.

Fyrsta bókakvøldið verður týskvøldið 7. november kl. 19.30, tá verður tað skaldsøgan ”Hundehoved” hjá danska rithøvundinum Morten Ramsland, ið tosa verður um.

Skaldsøgan ”Hundehoved” er ein ættarsøga um eina danskt/norska familju og teirra lív frá 1930’unum og fram til í dag.

Bókin liggur á metsølulistunum í Danmark og er mett at vera tann besta danska skaldsøgan í 2005. Í 2006 fekk rithøvundurin ”Læsernes Bogpris” fyri hesa skaldsøguna.

Í februar verður aftur eitt bókakvøld, tá er ætlanin at viðgera bókina ”Sólstormur” hjá Åsa Larsson, sum júst er komin út á føroyskum.

Bøkurnar, sum vera viðgjørdar eru til útláns á bókasavninum.

Fyri at so mong sum gjørligt kunnu lesa ”Hundehoved” áðrenn bókakvøldið, er lánitíðin fyri bókina 14 dagar.

## Nita Næs nýggjur skrivari hjá Javnaðarflokkinum



Javnaðarflokkurin hevur fingið nýggjan skrivara fyri Katrin Dahl Jakobsen sum hevur lagt frá sær. Nýggjur skrivari er Nita Næs úr Hvalba.

Nita Næs hevur verið áhugað í javnaðarapolitikki, síðani hon var heilt ung, og hevur á mongum landsfundi víst á, hvat hon heldur flokkurin ger gott, og hvat burdi og kundi verið gjørt betur. Hon hevur verið vanligur limur í Suðuroyar Norðara Javnaðarafelag í mong ár, og hevur tey seinastu árini verið næstformaður í felagnum. Til seinasta løgtingsval stillaði Nita Næs upp fyri Javnaðarflokkin í suðuroyar valdømi og fekk 96 atkvøður.

Nita Næs er útbúgin lærari á Føroya Læraraskúla. Hennara fyrstu lærararoyndir, fekk hon í Grønlandi, har hon tvey tey fyrstu árini arbeiddi í Mannitsoq, og síðan flutti triðja árið norður til Illorsuit, ið er lítil bygd, 90 km norðan fyri Uummanaq. Hetta var nakað heilt serlig, tí her var sjálvur Lars Emil føddur og vaks til tey fyrstu árini, og hetta var bygdafólkið stólt av og fortaldi nógv um, serliga Siumut-veljarin.

Nita hevur arbeitt sum lærari í Hvalbiar skúla í fimm ár. Í dag arbeiðir hon sum einalærari í Sandvíkar skúla, har ganga fimm skúlabørn, og hetta heldur hon vera ein sera stór avbjóðing. Og spennandi hevur tað verið, at seta seg inn í einalærarastarvið, har eini og sami persónur skal undirvísa og skapa karmar fyri eini undirvísing, ið er á hædd við aðrar skúlar í landinum.

Nita Næs er í løtuni í barnsburðarfarloyvi og hevur hon játtað at taka við sum skrivari í starvsnevndi fram til Landsfundin, har skrivarin skal veljast.

– Tá floksins leiðsla hevur havt meg í huganum til ein sess í starvsnevndini, sigi eg sjálvsagt ja. Tað eru alt ov nógvar kvinnur, ið siga nei, tá tær fáa álitisstørv litið upp í hendurnar, sigur Nita Næs á heimasíðuni hjá Javnaðarflokkinum.

Hon sigur, at í fyrstu syftu er tað mannagongdina hjá starvsnevndini, hon skal fáa innlit í.

– Sum javnaðaraveljari eri eg sjálvsagt áhugað í, hvat flokkurin arbeiðir við, hvussu verður t. d. floksins peningur brúktur, hvørja politiska leið velur flokkurin at fara í framtíðini, arbeiðir floksleiðslan so sum javnaðarveljarin vil, hvar stendur flokkurin í dag, hvør er kósin fram til næsta løgtingsval o. s. fv. Somuleiðis hugsi eg mær, at ivaleyst er nógv at læra í einari slíkari starvsnevnd. Og so tað, at flokkurin hevur hugsað um meg, sum búgvi á bygd og havi smábørn og kortini sær ein møguleika í tí. Jú, uppgávurnar kunnu uttan iva - gerast nógvar, spennandi og læruríkar, sigur Nita Næs.

## Ferðaráð Føroya og Menningarstovan leggjast saman

**Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, arbeiðir við at leggja Menningarstovuna og Ferðaráð Føroyar saman í ein vinnuframastovn og tískil verður uppgávan at menna føroysku vinnuna savnað, og brúkararin, íverksetarin og einstaklingurin við nýggjum hugskotum fær eitt stað at venda sær til, tá hann ynskir at fáa ráð og vegleiðing**



FERÐAVINNA
*Tíðindaskriv*

Missiónin hjá stovninum verður í stuttum; við ráðgeving, upplýsing og samstarvsátøkum at menna føroyskt vinnulív, herundir Føroyar sum ferðamannaland, stimbra nýskapan og íverksetan og við altjóða marknaðarføring gera Føroyar og vinnulívsmøguleikarnar her kendar.

Eftir ætlan fær brúkarin møguleika at venda sær til stovnin at fáa ráð og vegleiðing antin digitalt um ein heimasíðuportal ella hann kann venda sær beinleiðis til samanlagda stovnin. Samanleggingin av stovnunum stuðlar undir Visjón 2015, ið miðar í móti at beina allar forðingar av vegnum, soleiðis Føroyar kunnu gerast ein blómandi íverksetanardepil í altjóða høpi.

Ein arbeiðsbólkur undir Vinnumálaráðnum hevur sitið við uppgávuni at kanna, hvussu endamálini hjá Menningarstovuni og Ferðaráð Føroya, kunnu verða samansjóðað, og eitt dynamiskt umhvørvi verða skapt, ið styrkir tænasturnar til tað almenna og vinnulívið. Arbeiðsbólkurin handaði landsstýrismanninum frágreiðingina 4. september 2006, og á landsstýrisfundi 15. september 2006 tók landsstýrið undir við, at Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, arbeiðir víðari við málinum.

Ætlaða virksemið hjá samanlagda stovninum sambært vinnupolitikkin, verður

- at birta upp undir nýskapan og íverksetan.
- Í samstarvi við aðrar myndugleikar at samskipa mannagongdir innan fyrisiting, sum hava týdning fyri íverksetarar.
- at ráðgeva um íverksetan og gera íverksetaraportal, har íverksetarar fáa svar upp á spurningar um at stovna fyritøku.
- at marknaðarføra føroyskar vørur og tænastur og Føroyar sum eitt land at gera íløgur í.
- at menna ferðavinnuna í Føroyum og at marknaðarføra Føroyar sum ferðamannaland.

hetta er í mongum førum samanfallandi við verandi virksemi. Tó verða umsitingarligar uppgávur lagdar nýggja stovninum, sum hvørgin hevur førleika ella royndir í.

Í vinnupolitikkinum stendur, at Føroyar mugu gera meira burtur úr marknaðarføring av sínum fyrimunum enn tey øki, ið øll kenna avdráttarmegina frá. Endamálið við marknaðarføringini av Føroyum er sostatt at kveikja áhugan hjá útlendskari arbeiðsmegi og kapitali fyri vinnu- og vinningsmøguleikum í føroyska samfelagnum og í samvinnu við áhugaðar partar her á landi. Ætlanin er, at samanlagdi stovnurin skal taka sær av at marknaðarføra Føroyar miðvíst uttanlands. Marknaðarføring av føroyskum vørum og tænastum verður at halda fram í samstarvi við relevantu partarnar. Marknaðarføring verður bæði ein generell marknaðarføring av Føroyum og gjøgnum mest virknu miðlarnar og ein marknaðarføring við meira miðvísum tiltøkum, ið venda sær beinleiðis til møguligar íleggjarar.

Ferðafólk eru týdningarmikil fyri Føroyar millum annað tí, at hesi bera altjóða samfelagið til Føroyar samstundis, sum Føroyar gerast kendar í útheiminum. Kanningar vísa, at ferðavinnan skapar meira enn fýrafalt avleitt virksemi. Vaksandi kapping setir stór krøv til at marknaðarføra ferðamál. Menning og nýskapan hevur eisini stóran týdning og snúgva hesi seg um at gera ferðavinnuumstøðurnar betri, menna nýggj ferðavinnutilboð, gera kunningar- og tænastustigið betri ella menna góðskustýringarskipanir, sum skulu tryggja kundunum dygd og upplivingar.

Meiri fæst at vita við at venda sær til landsstýrismannin í vinnumálum